ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Svar
upp á

skrivligan fyrispurning nr. 68/2019 eftir tingskipanini § 52a til Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismann í almannamálum, frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni um byggingina av bústovnum til fólk við serligum avbjóðingum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu støðan er viðvíkjandi bygging av bústovnum til fólk við serligum avbjóðingum í Suðurstreymoy og aðrastaðni í landinum?
2. Kunnu vit vænta seinkingar í verkætlanum, sum eru farnar í gongd?
3. Hvussu langt er byggingin/prosjekteringin av sambýlinum á Mýrini komin?
4. Nær kann væntast, at sjálv byggingin av hesum sambýli fer í gongd?

Svar
Til 1:
Í løtuni verður arbeitt við trimum byggiverkætlanum, eins og eg havi upplýst fyri fíggjarnevndina 19. desember 2019. Hesar eru:

1. Heim til børn og ung við autismu (Kvíggjartún á Argjum)
2. Heim til fólk við menningartarni (á Mýrini í Hoyvík)
3. Heim til fólk við menningartarni og fjølbreki (húsfólkini á Eirargarði) (Reynstún á Argjum)

Afturat hesum verður eisini arbeitt við nøkrum smærri verkætlanunum. Uppskot til løgtingslóg um at dagføra verandi bústovnar er lagt fyri Løgtingið. Fíggjarkarmurin er 33 mió. kr. í alt yvir samgongutíðarskeiðið. Sambært hesum verða millum 20 og 25 nýggj búpláss útvegað. Byrjast kann beinanvegin í 2020, tá lógin er samtykt.

Viðv. Heimi til børn og ung við autismu hevur prosjektið verið í lisitatión, men av tí at tilboðini frá arbeiðstakarum lógu langt omanfyri kostnaðarmetingina, verður nú kannað, hvørjar sparingar kunnu gerast í prosjektinum. Gongst sum ætlað, verður verkætlanin boðin út aftur um tríggjar mánaðir. Byggitíðin er mett til 24 mánaðir.

Viðv. Heimi til fólk við menningartarni og fjølbreki (Reynstún) og Heimi til fólk við menningartarni (á Mýrini), verður eftir ætlan farið undir annað stig í prosjekteringini av hesum báðum heimum í næstum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Til 2:
Arbeiðið at prosjektera tekur langa tíð, og seinkingar hava verið í øllum verkætlanum av ymsum orsøkum. Hóast hetta, verður arbeitt við at prosjektera heimini í Reynstúni og á Mýrini liðug, eins og Kvíggjartún verður endurskoðað og eftir ætlan boðið út av nýggjum.

Til 3:
Skipanaruppskotið varð handað í september 2019, og farið verður undir at prosjektera annað stig í næstum.

Av tí at tað í sambandi við prosjekteringina hevur víst seg, at upprunaliga kostnaðarmetingin var ov lág, hevur Almannamálaráðið vent sær til Fíggjarmálaráðið við fyrispurningi um heimild er at prosjektera víðari.

Fíggjarmálaráðið hevur í skrivi 20. desember 2019 boðað frá, at tey meta, at heimild er at arbeiða víðari við at fyrireika verkætlanina, til eitt prosjektuppskot er gjørt (annað av fýra stigum í prosjekteringini).

Almannamálaráðið hevur tí í januar boðað Landsverki frá, at prosjektera Sambýlið á Mýrini sambært leistinum, sum Fíggjarmálaráðið stingur út í kortið í skrivinum frá 20. desember 2019. Ráðgevin hevur upplýst, at vegna aðrar uppgávur kann prosjekteringin ikki byrja fyrr enn í mai mánaði.

Til 4:
Ætlanin er at byrja at byggja á Mýrini seinni í ár.

29. apríl 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður